**SEMJA**

**MILLUM**

**FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG**
**OG**
**STARVSMANNAFELAGIÐ**

Omanfyri nevndu partar eru í dag samdir um at leingja sáttmálan fyri Posta til 1. januar 2022 við niðanfyri standandi broytingum.

Semjan byggir á ein karm á 3,26 % fyrsta árið, og 2,56 % annað árið.

1. Lønin hækkar í sáttmálaskeiðinum soleiðis:
   Hin 1. januar 2019 2,88 %
   Hin 1. januar 2020 2,18 %

   Lønarhækkingin á Posta tann 1. januar 2021 fylgir lønarkarminum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum verður avtalaður við arbeiðarafeløgini tann 1. mai 2020.

2. Í grein 1 verður sett inn nýtt stk. 2, sum sigur: "*Um Posta yvirtekur starvsøki ella virksemi, sum ikki eru umfatað av hesum sáttmála, verða hesi bert umfatað av sáttmálanum, um partarnir eru samdir um tað.*
   *Partarnir eru í hesum sambandi samdir um, at starvsfólk, undir verandi sáttmálaøki, kunnu ikki flytast yvir í størv uttan fyri sáttmálaøkið fyri lægri løn ella verri setanarviðurskifti*".

   Fylgjandi stk. í grein 1 broyta nummar samsvarandi.

3. Grein 13, stk. 2 verður strikað, og ístaðin verður sett inn henda orðing:
   "*Tey, sum hava nátt fólkapensiónsaldur, fáa ístaðin upphæddina, sum skuldi verið flutt sum eftirløn, útgoldna sum løn. Áðrenn upphæddin verður goldin, verða gjøld, sum skulu rindast samstundis sum lønin, tikin av upphæddini, soleiðis at útreiðslan hjá arbeiðsgevara verður óbroytt.*

   *Sama er galdandi fyri persónar, sum smb. § 1, skt. 5 í eftirlønarlógini eru frítiknir fyri at rinda til eina føroyska eftirlønarskipan.*

4. Broytingar verða gjørdar í lønartalvuni, soleiðis at Bólkur B og Bólkur C fáa tvey endastig afturat í sáttmálaskeiðnum.
   1. januar 2019 verður eitt endastig lagt afturat bólki B og bólki C, soleiðis at bólkur B gongur frá stig 6 – 19, og bólkur C gongur frá stig 13 – 20.
   1. januar 2020 verður eitt endastig lagt afturat bólki B og bólki C, soleiðis at bólkur B gongur frá stig 6 – 20, og bólkur C gongur frá stig 13 - 21.

   Sáttmálin og lønartalvan verða dagførd sambært hesum broytingum.

5. Í sáttmálanum fyri Posta § 32 verður "*1. januar 2017*" broytt til "*1. januar 2019*" og "*1. januar 2019*" broytt til "*1. januar 2022*".

SB UL

**Tórshavn, 20. desember 2018**

**Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Kristoffur Laksá

Marita Rasmussen

**Fyri Starvsmannafelagið**

Súni Selfoss/Anna Johannesen

Jóngerð Simonsen

Bjørg Jacobsen

Hildigerð Djurhuus